## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag og sunnudagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av suðri, seinnapartin nakað minni vindur. Yvirhøvur turt og sólglottar, men mjørki í støðum. Hitin millum 13 og 17 stig.




**Veðrið mánadagin:**
Lot til andøvsgul av landsynningi og yvirhøvur turt og sólglottar, men mjørki í støðum. Hitin millum 14 og 17 stig.

**Veðrið týsdagin og mikudagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av landsynningi og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 10 og 14 stig.

# Salurin verður shinaður

**Stóri salurin í Norðurlandahúsinum fær í hesum døgum eina umfatandi ajourføring. Største broyting-in verður, at nú ber til eftir stuttari løtu at broyta stólarøðirnar - ella taka tær burtur**

NORÐURLANDAHÚSIÐ
*Jákup Mørk*



*Teir arbeiða av øllum alvi, soleiðis at nýggju stólarøðirnar eru klárar at taka í nýtslu um eina viku*

Teir arbeiða av øllum alvi í Norðurlandahúsinum. Stóri salurin, sum vanliga hýsir teimum størru tiltøkunum, sum eru í húsinum, verður í hesum døgum renoverað.

At síggja til verður talan kanska ikki um tær heilt stóru broytingarnar. Stólarnir sum verða skiftir út, verða nú nakað fleiri í tali og smærri umvælingar verða eisini gjørdar. Men hjá teimum, sum dagliga varða av salinum, verður stórur munur framyvir.

Serstakliga er tað uppbyggingin av áskoðarasessunum, sum verður broytt til tað betra. Við nýggju konstruktiónina verður tað munandi meira ómaksleyst at broyta talið av sitiplássum - ella heilt at taka hesi burtur. Verður hetta seinasta gjørt, verður talan um velduga høll, sum er sera væl egnað til framsýningar av ymsum slag. Tað er eitt arbeiði, sum áður hevur tikið fleiri dagar, hvørja ferð broytingar skuldu gerast.

Sagt verður, at broytingarnar av høllini kosta næstan tvær milliónir. Av hesum hevur grunnurin hjá A.P. Møller játtað at rinda eina góða helvt, meðan Norðurlandahúsið sjálvt rindar restina.

Um eina viku verður arbeiðið liðugt, og verður tað Tórshavnar Manskór, ið verða teir fyrstu at nýta nýggja salin. Hetta verður, tá teir tann 22. oktober kl. 19.30 hava konsert.

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | 0 |
| Nuuk | 1 |
| Qaqortoq | -1 |
| Ammassalik | -2 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 1 |
| Seyðisfjørður | 3 |
| Tórshavn | 5 |
| Lerwick | 8 |
| Aberdeen | 11 |
| London | 13 |
| Tromsø | 6 |
| Bergen | 12 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 15 |
| Keypmannah. | 16 |
| Helsinki | 10 |
| Moskva | 10 |
| Berlin | 15 |
| Warzawa | 10 |
| Kiev | 12 |
| Bukarest | 12 |
| Paris | 22 |
| Madrid | 14 |
| Róm | 21 |
| Malorca | 23 |
| Athen | 23 |
| Malta | 22 |
| Tunis | 27 |
| Beijing | 19 |
| New Dehli | 31 |
| Bangkok | 32 |
| Jakarta | 33 |
| Sydney | 18 |
| New York | 16 |
| Miami | 29 |
| Los Angeles | 26 |
| Meksikobýur | 19 |
| Panama | -- |
| La Paz | -- |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 22 |

## LUFTTRÝSTIÐ




**Í gjár:**
Eitt hátrýst, 1029 hPa. yvir Bretsku Oyggjunum fer móti Norska Havinum og mennist. Eitt lágtrýst, 977 hPa. á 48N-31V fer norðureftir og hitabrúgvin haðani fer um Føroyar fríggjakvøldið.




**Í dag:**
Hátrýstryggurin frá Skagerrak til Lofoten stendur mestsum í stað, men viknar nakað. Vestan fyri hátrýstryggin rekur lýggj luft av suðri móti Føroyum.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 13/10 kl. 06[00]– 14/10. 06[00]. Hitin í gjár: 5,1°
Minsti hiti máldur í okt.: - 4,0° - Mesti hiti máldur í okt.: 18,4°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 2,0 mm – mált frá 13/10 kl. 06[00]– 14/10 kl. 06[00]
Avfallið higartil í oktober: 79,4 mm

## ÚF Morgunlestrar
**17. - 22. okt.**

***Eilin Andreasen í Leirvík, lesur***

**Sálmar og skriftstøð:**

**Mánadagin 17. okt.:**
nr. 57 Mær halda Harrans hendur
*Matt. 14,25*
nr. 583 Mín bátur er lítið, títt hav er so stórt

**Týsdagin 18. okt.:**
nr. 158 Far út við tíni nót á dýpið, Pætur
*Matt. 4,20*
nr. 507 Onga tíð er frá mær váði

**Mikudagin 19. okt.:**
nr. 284 Mítt ljós í myrkri, Jesus Krist
*Jóhs. 8,12*

**Hósdagin 20. okt.:**
nr. 73 Kæri Jesus, eg vil bíða
*Róm. 5,1*
nr. 412 Har trúgv á Guð er til

**Fríggjadagin 21. okt.:**
nr. 486 Hjá Hesusi eg søki frið
*Jóhs. 14,6*
nr. 234 Sannleikans andi

**Leygardagin 22. okt.:**
nr. 248 Guðs kirkjulið er heimsins størsta undur
*Jóhs. 17,21*
nr. 76 Jesus, hitt einasta

## VESTFALLSKYRRINDI

10. oktober Fyrra kvarter
14. oktober Mánin næstur jørðini
17. oktober Fullmáni

Kelda. Álmanakkin 2005

| | Suðuroyar-/ Vágafirði | | Skúvoyar-/ Skopunarfirði | | Hestfirði/ Sundalagnum | | Vestmanna-sundi | | Mykines-firði | | Nólsoyar-firði | | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi | | Leirvíksfirði/ Haraldssundi | | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði | | Hvanna-sundi | | Fugloyar-firði | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Dagur | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. |
| 15. Okt. | 05.21 | 17.44 | 04.21 | 16.44 | 04.36 | 16.59 | 07.21 | 19.44 | 08.21 | 20.44 | 03.36 | 15.59 | 02.36 | 14.59 | 05.36 | 17.59 | 06.36 | 18.59 | 05.06 | 17.29 | 06.21 | 18.44 |
| 16. Okt. | 06.08 | 18.30 | 05.08 | 17.30 | 05.23 | 17.45 | 08.08 | 20.30 | 09.08 | 21.30 | 04.23 | 16.45 | 03.23 | 15.45 | 06.23 | 18.45 | 07.23 | 19.45 | 05.53 | 18.15 | 07.08 | 19.30 |
| 17. Okt. | 06.52 | 19.16 | 05.52 | 18.16 | 06.07 | 18.31 | 08.52 | 21.16 | 09.52 | 22.16 | 05.07 | 17.31 | 04.07 | 16.31 | 07.07 | 19.31 | 08.07 | 20.31 | 06.37 | 19.01 | 07.52 | 20.16 |
| 18. Okt. | 07.41 | 20.05 | 06.41 | 19.05 | 06.56 | 19.20 | 09.41 | 22.05 | 10.41 | 23.05 | 05.56 | 18.20 | 04.56 | 17.20 | 07.56 | 20.20 | 08.56 | 21.20 | 07.26 | 19.50 | 08.41 | 21.05 |
| 19. Okt. | 08.29 | 20.54 | 07.29 | 19.54 | 07.44 | 20.09 | 10.29 | 22.54 | 11.29 | 23.54 | 06.44 | 19.09 | 05.44 | 18.09 | 08.44 | 21.09 | 09.44 | 22.09 | 08.14 | 20.39 | 09.29 | 21.54 |

5 707265 100067 >